# Kim blásti av

Kim Ejdesgaard dømdi fyri seinastu ferð, tá steypafinalan hjá kvinnum varð avgreidd sunnudagin



*Seinastu kortini eru nú givin hjá Kim Ejdesgaard*

JÁKUP MØRK

Eftir at hann í 23 ár hevur havt ábyrgd av at stýra dystum í fremstu føroysku fótbóltsrøðini, hevur Kim Ejdesgaard takkað fyri seg.

Steypafinalan hjá kvinnunum, var seinasti dystur, sum Kim dømdi. Eftir dystin helt formaðurin í dómarafelagnum, Hans F. Hansen, stutta røðu, har hann takkaði Kim fyri tíðina, sum hann hevur fingist við hetta ítrivið.

**Sum narkotika**

Tá vit seinni fingu orðið á Kim, har hann í skiftirúminum sat við blómutyssum og øðrum gávum, tóktist dómarin at vera rímuliga avkláraður um, at hann ikki skal døma aftur.

Spurdur um minnini, segði hann, at tað í ovurstóran mun vóru positiv minni, sum hann hevði frá yrkinum. – Hetta er akkurát sum narkotika. Tú verður so at siga bundin av skula á vøllin hvørt vikuskifti, helt hann fyri, tá vit spurdu hann, hvussu dómaratíðin hevur verið.

Tá vit síðani spurdu hann, hvussu man so skuldi bera seg, um man ætlaði at gevast, segði hann, at tað so at siga var ein longri process: – Seinasta árið ella so havi eg spakuliga fyrireika meg til, at tað skjótt skuldi vera liðugt hesum viðvíkjandi, so hetta er ikki nøkur avgerð, sum eg havi tikið her og nú. Eg haldi tað eisini vera tíð uppá, at aðrir dómarar sleppa framat, og tað er synd, um onkur ungur áhugaður ikki sleppur framat, tí ein gamal maður stendur í vegin fyri hesum, sigur Kim.

**Framvegis til nyttu**

Sum nevnt, so hevur Kim dømt fótbólt á hægsta stigi í Føroyum seinastu 23 árini. Eftir at hann í eini tvey ár hevði verið linjuverji, byrjaði hann í 1977 at floyta, og hetta hevur hann so gjørt síðani.

Nú hann sum 45 ára gamla leggur floytuna á hillini, er eisini nærliggjandi at spyrja, hvat hann ætlar at fáa sunnudagarnir at ganga við í framtíðini.

Til hetta svarar hann, at hann fyri fyrst hevur ætlanir um at virka sum eygleiðari: Kann eg á nakran hátt hjálpa til í so máta, so geri eg tað fegin, sgiru Kim at enda, og sýnir við heusm, at hóast hann nú er givin við floytuni, so hevur hann á ongan hátt mist áhugan. Hvørki fyri dømingini ella fyri fótbóltinum.

# Takkaði við gullmerki

*Martin Thomsen, sum í vár hevur styrkt um í GÍ verjuni, fór av aftur landinum í gjár*

JAKUP MØRK

- Tað var tað í øllum førum, varð svarið, sum vit fingu, tá Martin Thomsen varð spurdur, um hetta var ein góður háttur at enda føroyaævintýr sítt.

**Avstað í gjár**

Við hesum meinti hann við, at hann við hesum fekk givið sítt íkast til, at árið hóast alt fer at hylnast hampuliga væl hjá gøtumonnum. Í landskappingini hevur jú als ikki gingið eftir vild, men sum Martin sigur, so er tað ofta tær feskastu hendingarnar, sum standa klárastar í minninum.

Tá flúgvarin í gjáramorgunin fór til Danmarkar, var sterki danski verjuleikarin umborð, og í hesum umfarinum er føroyaferð hansara av. – Tað er so í øllum førum ætlanin, um eg altso orki upp í morgin, sigur hann við einum smílið, og sipar til, at tað helst var veitsluhald av onkrum slag í Gøtu sunnukvøldið.

**Kanska aftur**

Um talan er um eitt endaligt farvæl, dugdi Martin tó ikki at siga:

- Komandi hálva árið skal og so eystureftir at ferðast, men hvat síðani hendir, veit eg ikki, sigur hann. Tá tosað verður við hann, først tú tó beinan vegin kensluna av, at hann hevur trivist sera væl í Gøtu, og hesum váttar hann eisini:



*Møguliga verður Martin aftur at síggja í GÍ búnanum í framtíðini*

***Mynd: Jan Müller***

- Tá ein soleiðis kemur at spæla fótbólt, heldur man kanska, at tað bert er venjing og hvíld, men soleiðis hevur als ikki verið í Gøtu. Eg havi verið sera væl móttikin av øllum, og eri sera takksamur fyri tíðina, sum eg havi havt, har eg altíð havi verið boðin við, tá okkurt er á vási.

Eg havi eisini tosað við leiðsluna í GÍ og greitt teimum frá, at nú sáttmálin hjá mær við Holstebro rennur út, verður tað nógv bíligari hjá felagnum at hava meg í Føroyum, um teir altso eru áhugaðir, sigur Martin at enda.

Sostatt røkist kanska fyri, at danin aftur verður at síggja í Gøtu komandi kappingarár, men fyribils hevur hann tó sagt farvæl.

# Tað var ræðuligt

*Góðan helming av dystinum mátti Malena Josephsen hyggja at, meðan liðfelagarnir stríddust fyri steypinum*

JÁKUP MØRK

Vónirnar hjá KÍ fyri einum steypasigri fingu eitt skot fyri bógvin, tá Malena Josephsen noyddist av vøllinum seint í fyrra hálvleiki.

**Spældi við pínu**

Malena greiddi frá, at orsøkin til hetta var samanbresturin, sum hon hevði við Anniku Hansen í HB málinunm tíðliga í dystinum, tá tær báðar fóru eftir bóltinum.

Hóast pínu, so royndi Malena at stríðast í ein hálvan tíma afturat, og eisini hevði hon onkra roynd móti HB málinum. At enda var pínan tó ov stór, og hon noyddist tí at hyggja at, meðan liðfelagarnir stríddu sigurin til høldar.

**Ræðuligt**

Sjálv segði hon eftir dystin, at tað var ræðuligt at hyggja at: - Vit høvdu alt spælið, men tað sá ógvuliga svart út, tá tað ráddi um at skjóta mál, helt hon fyri. Tá so málið kom, sást hon fara lakkandi á einum beini yvir at fagna liðfeløgunum, og hon duldi ikki fyri, at gleðin var ovurstór, tá tað gjørdist greitt, at sigurin var fingin til høldar.

**Býráðið hevði álit**

Ein partur av fyrireikingunum hjá KÍ-kvinnunum var, at tær fríggjadagin vóru bodnar til býráðshúsið.

Sjálv helt Malena, at hetta var við til at seta tær upp, og hon bað okkum í hesum sambandi veita býráðnum eina tøkk fyri hetta.

Annars legði hon afturat, at tær satt at siga undraðust eitt sindur í fjør. Áðrenn steypafinalurnar, har KÍ tá átti umboð hjá bæði monnum og kvinnum, vórðu menninir bodnir í býráðssalin, meðan kvinnurnar einki hoyrdu. Fríggjakvøldið fingu tær so eina frágreiðing til hetta. Orsøkin til væntandi innbjóðingina tá var nevnliga, at býráðið ikki roknaði við, at tær fóru at vinna, segði hon við einum smíli.

Hvat sunnukvøldið nú hevði at bjóða uppá, visti hon ikki, tá vit søgdu farvæl við hana. Einasta, sum lá fast, var at tær skuldu saman til Shang-Hai matstovuna í Klaksvík at eta ein góðan bita, men ivaleyst hava tær hugna sær óført har norðuri sunnukvøldið.

# Kappró›ur



Stór umrø›a av kapprór›inum á Sundalagsstevnuni í morgin



# Endiliga vann KÍ steypið

*Í fjórðu royndini eydnaðist tað KÍ-kvinnunum at vinna steypafinaluna, tá tær aðru ferð innan eina viku megnaðu at basa HB*



*Rannvá Andreasen setti eitt virðiligt punktum, tá hon einsamøll syrgdi fyri 2-0 málinum móti HB*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

JÁKUP MØRK

HB-KÍ 0-2 (0-0)

Í fagrasta veðrið varð fyrra av teimum báðum steypafinalunum blást ígongd sunnudagin.

Kvinnurnar úr Klaksvík komu til Havnar, við vón um at tað endiliga skuldi eydnast teimum at vinna steypakappingina. Tríggjar ferðir áður høvdu tær verið í hesi støðu, men hvørja ferð vóru tær farnar av vølli sum taparar.

Nærmast vóru tær helst, tá tær í fjør máttu lúta fyri HB eftir umdyst, men hetta skuldi ikki verða í ár.

**Styrkurin varð av ongum**

KÍ hevur helst í løtuni sterkasta kvinnulið í landinum, og fyri at styrkja enn meira um hópin, varð gjørt av leiga Hillerød áleyparan, Lisbeth T. Hansen, til henda eina dystin.

Styrkurin varð tó av ongum. Flogfarið við danska leikaranum lendi í øllum góðum, og sostatt hldu tey í Klaksvík, at alt stóð væl til. Tað vísti seg tó, at tær høvdu gloymt at tikið hædd fyri onkrari grein í ásetingunum hjá FSF. Fyri at fáa spæliloyvi, skal leikari nevnliga vera fastbúgvandi í Føroyum, og tískil fingu klaksvíksgenturnar als ikki gjørt nýtslu av ætlaða styrkinum.

HB hevði hinvegin styrkt nakað um sín leikarahóp. Fyrrverandi liðskiparin, Eyðvør úr Dímun, var nevnliga komin heim úr Danmark, og bæði leikliga og sálarliga mundi hetta styrkja um vónirnar hjá HB fyri enn einum steypasigri.

**Stórur munur**

Hvussu var og ikki við teimum styrkunum, sum liðini bæði ætlaðu sær, so er einki at taka seg aftur í, at KÍ var stórfavorittur at vinna dystin.

Fyri viku síðani hølvaðu tær HB sundur og saman, og hóast trivaligi 8-0 sigurin í stóran mun var grundaður á tað sannroynd, at einans 10 havnargentur vóru komnar til Klaksvíkar, so mundi hetta vera ein góð sálarlig barlast hjá KÍ sunnudagin.

Tað tóktist eisini greitt, tá dysturin byrjaði, at KÍ mest sum ætlaði at gera bart beinanvegin. Fyrsta korterið var bólturin so at siga ikki at síggja á KÍ hálvuni, tí KÍ trýsti og trýsti alla tíðina.

Trýstið kastaði tó einki mál av sær, og spakuliga byrjaði HB at koma betri við í spælið. Tær høvdu tó ógvuliga torført við at fáa veruliga glið á spælið, tí klaksvíksgenturnar ansaðu væl eftir, at serliga Annika og Eyðvør ikki fingu frið til nakað sum helst. Mest eyðsýndi HB leikarin var helst Eyðfríð Christiansen, sum úr vinstru síðu fleiri ferðir royndi at koma fram við.

**Ragna slapp væl**

Tað einu ferðina átti ein av hesum royndunum helst at viðført reytt kort til verjuskiparan hjá KÍ, Ragnu Andreasen, men hon slapp við gulum.

Hevði talan verið um reytt, kundi dysturin ivaleyst fingið eina aðra gongd, men alt tílíkt tos verður bara til hypotesur.

KÍ var snøgt sagt nógv betri. Sum sagt, so fingu tær fatur á tí mesta á miðvøllinum, og hóast talan ikki gjørdist um teir stóru møguleikarnir, so tóktist alla tíðina at vera bit í álopinum. Tað var tó ein dyggur smeitur, tá Malena Josephsen noyddist út móti endanum av fyrra hálvleiki. Tíðliga í dystinum rendi hon saman við HB málverjanum, men hon megnaði tó at halda á okkurt um hálvan tíma, og hevði eisini ein góða roynd móti málinum.

**Broyting gav úrslit**

Fyrra hálvleik hevði KÍ venjarin gjørt av, at Rannvá Andreasen skuldi gera um seg á miðvøllinum, har hon mest hevði til uppgávu at ansa eftir Eyðvør úr Dímun.

Hetta tóktist kanska eitt sindur løgið, tí í veruleikanum var hetta størsta forðingin fyri, at KÍ kundi fáa veruligt glið á álopsspælið.

Seinna umfarið varð broytt, soleiðis at Rannvá nú var nógv meira álopssinnað, og beinanvegin sást, at nú kom nógv meira broddur í álopið.

Tá málið kom, stóðst hetta tó av uppsælið í vinstra borði, og ikki høgra, har Rannvá gjørdi um seg. Una Olsen hevur í vetur víst, at hon hevur skjótleikan til at gerast ein góður hondbóltsvongur, og sunnudagin prógvaði hon, at tað sama er galdandi í fótbóltinum.

Eitt sindur heppi fekst bólturin inn um HB verjuna, og eingin av teimum reyð/svørtu fekk fylgt við Unu, sum smekkaði til. Annika í HB málinum fekk hálvavegna, men bara hálvavegna, vart fyri, og spakuliga rullaði bólturin seinastu leiðina inn í málið.

**Dovnaði**

Einki er at ivast í, at leiðslumálið var fult uppiborið, líkt var eisini til, at hetta i roynd og veru avgjørdi dystin.

KÍ-genturnar tóktust nøgdar, nú tær vóru á odda. Rannvá varð aftur flutt longur aftur á vøllin, og yvirhøvur royndu tær nú sum mest at verja leiðsluna, fyri síðani at leggja dent á mótálop.

Tað løgna var, at fortreytirnar fyri slíkum als ikki gjørdist betri, nú tær vóru á odda.Hóast aftanfyri, so helt HB framvegis fast um verjukenda útgangsstøðið.

Móti endanum av dystinum fullu KÍ leikararnir tó nakað langt aftur á vøllin, og nú byrjaði HB so spakuliga at nærkast málinum. Tað hjálpti eisini, at Eyðvør Thomsen, sum als ikki er komin fyri seg eftir skaðan, varð skift út, so Maria Johnsson slapp longur fram á vøllin.

**Vórðu revsaðar**

Bæði verja og miðvøllur hjá HB dittaðu sær nú longur fram á vøllin, men við eitt var brádliga liðugt.

Rannva Andresen, sum hevði roynt okkurt gjøgnumbrot áðrenn, setti nevnliga eitt virðiligt punktum fyri finaluna.

Miðskeiðis á HB hálvuni fekk hon fatur á bóltinum, og eftir at hava drigið framvið allari HB verjuni, bankaði hon bóltin flatt við handaru stong, uttan nakran sum helst møguleika hjá Anniku Hansen í HB málinum.

Tá vóru kanska einir tveir minuttir eftir at leika, og seinastu løtuna var sostatt eingin ivi um, at steypið endiliga skuldi til Klaksvíkar at verða í øllum førum eitt ár.

**Uppiborið**

Eftir dystin helt Leivur Hansen, borgarstjóri í Havn, røðu, har hann, umframt at handa steypið, eisini ynskti KÍ tillukku við sigrinum.

Skemtiliga tók hann fyri, at hann so at siga varð snýttur at halda røðu, tí hann roknaði við, at tá hann varð biðin, so mundi tað vera, tí HB skuldi fara at vinna finaludystin.

Hann legði tó afturat, at tað uttan iva var uppiborið, nú tað ístaðin gjørdist KÍ, sum fór við steypinum, og starvsfelagin í Klaksvík, Jógvan við Keldu, var eisini púra samdur við Leivi í hesum.

Teir høvdu eisini rætt í hesum, borgarstjórarnir. KÍ var betra liðið í finaludystinum, og hóast HB royndi at muta nakað ímóti eina løtu, so tykist tað í løtuni soleiðis, at hetta ikki verður einasta steypið, sum skal til Klaksvíkar í ár.

Finalan í steypakappingini hjá kvinnum

**HB-KÍ 0-2 (0-0)**

0-1: Una Olsen

0-2: Rannvá Andreasen

Dómari: Kim Ejdesgaard

**HB:**

Annika Hansen – Maria Johnsson, Brynhild Absalonsen, Silja á Borg, Fríða Petersen – Eydna Skaale, Annika Godtfred, Eyðvør úr Dímun, Eyðfríð Christiansen, Lotte K. Sørensen, Eyðvør Thomsen

**KÍ:**

Paula Sjóstein – Paula Mikkelsen, Ragna Andreasen, Annelisa Justesen – Jensa Sirdal, Bára Skaale, Rannvá Andreasen, Petra Sjóstein, Una Olsen – Malena Josephsen